Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil-stjórin bjartskygdur áðrenn veðurlagsfundin í Paris

**Jógvan Hugo Gardar**

20.10.2015 - 09:27

Oljan.fo

Hóast Statoil-ur, Eldar Sætre, ikki roknar við at veðurlagstoppfundurin í Paris kemur at fina eina loysn a sokallava prísingini av CO2-útlatinum, so er hann jaligur, og roknar við einum fundi sum kemur at geva eina áhugaverda avtalu. Tað sigur hann i samrøðu við Dagens Næringsliv.

- Vit stuðla eini veðurlagsavtalu, eini avtalu sum kemur at gera broytingar, og vit rokna við at vit fara at fáa eina avtalu sum setir krøv til allar partar, sigur Eldar Sætre.

Eldar Sætre var ein av átta oljustjórum sum friggjadagin undirskrivaði eitt bræv áðrenn veðurlagstoppfundin, men hann er varin við at siga hvat hann roknar við kemur burturúr.

- Men eg eri rættuliga bjartskygdur, og rokni við at vit kunnu fáa eina góða og krevjandi avtalu uppá pláss í Paris, sigur Sætre í samrøðuni við Dagens Næringsliv.